## Kapittul 4
## Hámark fyri innihald av tjøruevni, nikotini og kolsúrevni v.m. Ávaringartekstur um heilsuvandar

**§ 4.** Ikki er loyvt at selja ella á annan hátt at avhenda sigarettir, sum innihalda meiri enn: (It is not allowed to sell or provide cigarettes which contain higher concentrations of the following ingredients than stated below.)

1) 10 mg tjøruevni fyri hvørja sigarett. 10 mg of tar in each cigarette
2) 1 mg nikotin fyri hvørja sigarett. 1 mg of nicotine in each cigarette
3) 10 mg kolsúrevni fyri hvørja sigarett. 10 mg of CO in each cigarette

*Stk. 2.* Innihaldið í stk. 1 skal mátast samsvarandi viðkomandi ISO-standardi.

**§ 5.** Pakkar við sigarettum kunnu einans verða seldir, um teir hava innihaldslýsing, sum í minsta lagi upplýsur um innihaldið sbrt. § 4.

**§ 6.** Allir pakkar, undantikið apoteksvøra við nikotininnihaldi, sum er ætlað at hjálpa fólki at leggja av at roykja, skulu merkjast við einari av niðanfyri nevndu almennu ávaringum og ískoytisávaringum: (All packs that contain nicotine except those sold in the pharmacy, which are intended to help people quit, must be marked with one of the following general warning statements and an additional warning text.)

1) Almenn ávaring:
   a) Royking drepur. Smoking kills.
   b) Royking er sera skaðilig fyri teg og títt umhvørvi. Smoking is very damaging to you and your environment.
2) Ískoytisávaring:
   a) Royking styttir livialdurin. Smoking shortens lives.
   b) Royking hevur æðrakálking við sær og elvir til hjartatilburð og slagtilburð. Smoking causes artheriosclerosis and heart disease.
   c) Royking elvir til deyðiligan lungnakrabba. Smoking promotes deadly lung cancer.
   d) Fostrið verður skatt av royking. A fetus is damaged by smoking.
   e) Verj børn móti tubbaksroyki - tey hava sjálv rætt til at velja. Protect children from passive smoke, they have a right to choose clean air.
   f) Lækni tín ella Apotekið kunnu hjálpa tær við at leggja av at roykja. Your doctor or pharmacist can help you quit smoking.
   g) Royking er sera vanaelvandi; lat verða við at byrja. Smoking is very addictive; don’t start.
   h) Vilt tú minka um vandan fyri deyðiligum hjarta- og lungnasjúkum, legg so av at roykja. If you want to reduce your chances of getting deadly heart and lung disease, quit smoking.

i) Royking kann viðføra ein spakuligan og pínufullan deyða. Smoking can lead to a slow and painful death.

j) Fá vegleiðing til at leggja av at roykja: www.apotek.fo. Get quitting help from www.apotek.fo.

k) Royking kann minka um blóðrenslið og viðføra kynsligt máttloysi (impotens). Smoking can reduce circulation and lead to errectile disfunction.

l) Royking ger húðina rukkuta. Smoking causes skin wrinkles.

m) Royking kann skaða sáðgóðskuna og kann minka um fruktbæri. Smoking can damage sperm and reduce fertility.

n) Tubbaksroykur inniheldur benzen, nitrosaminir, formaldehyd og cyanbrintu. Tobacco smoke contains bezene, nitrosamines, formaldehyde and cyanide.

*Stk. 2.* Almenna ávaringin skal fylla minst 30% á aðrari av teimum størstu síðunum á pakkanum. Ískoytisávaringin skal fylla minst 40% av hinari av teimum størstu síðunum á pakkanum. General warning labels should cover 30% of one of the largest sides of the tobacco pack. The additional warning text shall cover 40% of the other largest side.

*Stk. 3.* Fyri pakkar til aðrar tubbaksvørur enn sigarettir, har flatarmálið á síðuni á pakkanum er størri enn 75 cm², skal økið fyri hvørja av ávaringunum verða minst 22,5 cm². For packs of other types of tobacco products, where the flat area is greater than 75 $cm^2$, the warning label shall cover 22.5 $cm^{2.}$

**§ 7.** Ávaringarteksturin sbrt. § 6 skal lúka hesi krøv: Warning labels shall meet these criteria.

1) Prentaður við svartari og feitari skrift í skriftslagnum Helvetica á hvítari grund. The type shall be black and bold helvetica on a white background.
2) Skriftstøddin skal tryggja, at sum mest av økinum, sum er ætlað til ávaringina, verður brúkt.The type should fill as much of the warning label area as possible.
3) Miðsettur á økinum, sum er ætlað til ávaringartekst, parallelt við yvirkantin á pakkanum.The warning panel shall be set parallel with the pack heading.
4) Ávaringarøkið skal hava svarta rond, ið er minst 3 mm og hægst 4 mm breið og sum á ongan hátt órógvar ávaringina. The warning label area shall have a border line that is at least 3 mm and no more than 4 mm thick and this line should not infringe on the warning message.

**§ 8.** Fyri aðrar tubbaksvørur enn sigarettir, kann teksturin verða settur á við sjálvklistrandi merkjum, treytað av, at hesi ikki lættliga kunnu takast av. Other tobacco product warning labels (other than cigarettes) can be afixed with a sticker as long as that sticker cannot be removed easily.